**Mentamálastýrið**
*Landsmiðstøðin*

# Lærugreina-ráðgevar

**Starvið**
Í Mentamálastýrinum/-Landsmiðstøðini eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2002.

Ráðgevingin fatar um lærugreinirnar **føroyskt, landalæru, søgu, samtíð, týskt, danskt, støddfrøði, alis-/evnafrøði, tónleik og serundirvísing**. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum høpi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir.

Samanlagt eru 45 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 1/2 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 8 til 12 lønartímum um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta KT í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevar verða settur eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tey, ið sett verða, skulu undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. apríl 2002.

Gjøllari upplýsingar fáast frá stjóranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Mentamálastýrið og Landsmiðstøðin**

**Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. **Landsmiðstøðin** er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingaramboð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálastýrinum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri fakligum, námsfrøðiligum skeiðum fyri lærarum og skúlamyndugleikum.

# Grundstykki í Havn

Eitt grundstykki í Blákollugøtu 5 í Havn er til sølu um hóskandi boð fæst. Stykki er 520 $m^2$, byggibúgvi og lættligt at byggja á. Tað liggur sera væl fyri við góðum útsýni og nær miðbýin.

Áhugað kunnu ringja **217286** aftaná kl. 16.00

# So er fløgan aftur at fáa...

17 SANGARAR SANGIR

Keypið fløguna í vanligu fløgu-handlunum kring landið






# Hjálparfólk til Tannlæknastovuna

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir hjálparfólki at byrja 1. mai ella eftir nærri avtalu, møguliga fyri eitt longri tíðarskeið.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til okkara á telefon 315158.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Tannlæknastovuna í Brekkugøtu 8, 100 Tórshavn, og má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. mars 2002.

**Tannlæknastovan í Brekkugøtu**
v/ Marnar Gaard, Ísak Thomassen og Regin Eikhólm, tannlæknar

TÓRSHAVNAR KVØLD- OG UNGDÓMSSKÚLI

# PRAG

Fyrilestrar um høvuðsstaðin í Tjekkia verða fýra týskvøld í apríl 2002 í Kommunuskúlanum. Fystu ferð 2. apríl í stovu 105 kl. 17.00 – 19.00.

Fyrilestrarnir eru ætlaðir fólki, sum kanska hugsa um at fara til henda sjáldsama gamla bý í Mið–Evropa at ferðast, ella sum bara vilja vita meira um søgu, mál og mentan har, um lívið í Prag.

Fyri at hava okkurt at leiðbeina seg við, kundi tað verið gott at fingið sær fatur á bókini "Turen går til Prag", sum Politikens Forlag, Keypmannahavn, hevur givið út.

***Lærari:*** Bozena Rasmussen

# Skrivari

Søkt verður eftir skrivara til Leirvíkar kommunu at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðsuppgávur:**
- skrivari hjá bygdarráðnum og nevndum
- journalisering
- fólkayvirlit
- fíggjarviðurskiftir
- aðrar skrivstovuuppgávur

Bygdarráðið er í fer við at gera eina starvsfólkaskipan fyri Leirvíkar kommunu og í tí sambandi kunnu broytingar verða í arbeiðsuppgávunum.

**Førleiki:**
Útbúgving og/ella royndir innan almenna umsiting og roknskap er ein treyt, eins og kunnleiki til nýtslu av teldu.

**Løn:**
Løn sambært avtalu við avvarðandi yrkisfelag.

**Upplýsingar og umsókn:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006 ella Sjúrð Eliasen, borgarstjóra, tlf. 213006.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum og ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 5. apríl 2002 kl. 12.**

Bygdarráðið skilar sær rætt til frítt at velja millum umsøkjararnar ella ongan at taka.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

# Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærara fyri lærara í farloyvi. Lærarin skal helst kunna undirvísa í rokning, náttúru/tøkni, alis- og evnafrøði og smíð, men annars ber til at leggja tímatalvuna um.

Lærarin skal helst kunna byrja beint eftir páskir og verður settur til 30. juni 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóannes Fonsdal, skúlastjóra, tlf. 424105 ella 424264, ella Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

**Umsókn verður send til:**
Jóannes Fonsdal, skúlastjóra,
350 Vestmanna

**Vestmanna Skúli**
350 Vestmanna
Tlf. 424105 • fax. 424104
e-mail: vestmanna@skulin.fo

# Føroyskt ross til sølu

**Tlf. 316896 – 216896**



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## VALLISTAR

Sagt verður frá, at vallistar til løgtingsvalið tann 30. apríl 2002 í Tórshavnar kommunu eru til skjals í snarskivuni í Havn, í "undirhúsinum" á Argjum, hjá Sjúrði Nysted í Kaldbak og á kommunuskrivstovuni í Kollafirði frá 25. mars til 5. apríl 2002.

Kærur um skeivleikar á listanum skulu sendast býráðnum í seinasta lagi 4 dagar eftir, at framløgufreistin er úti.

SNARSKIVAN

# Virkisbygningur í Klaksvík

Við hesum verða ognirnar matr. nr. 91 og 92, Klaksvík, tilsamans 3.079 $m^2$ við ábygdum virkisbygningi, lýstar til sølu.

Virkisbygningurin er í 3 hæddum – tvær á umleið 1.000 $m^2$ og ovasta hæddin umleið 500 $m^2$.

Ognin liggur á vestara keiøkinum við Faktorsveg, ið sambært byggisamtyktini fyri kommununa er lagt av til havnaendamál.

Selt verður, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær undirritaðu

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
Att.: Fríða Patursson, adv.

# Brúktur kranabilur til sølu

MAN 463.32 8 x 4, árg. 1998 við Effer 25 tons krana við radiostýring. 3 vegis vippulast við 3 deildum alu-síðum. Km 65.000.

**BERG MOTORS**
**Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35**

# Fimleikur – callanetice

Callanetice fimleikur byrjar mikukvøldið 3. apríl.

**Lærarar:** Steintóra H. Nesá, tlf. 444720
Áshild Kristiansen, tlf. 444621

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
tlf. 444087

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Deildarstjóri til Almanna- og heilsumálastýrið

**Eitt starv sum deildarstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum er leyst at søkja. Deildarstjórin skal virka sum stjóri á Almannadeildini, ið er ein trimum deildum í Almanna og heilsumálastýrinum. Talan er um eina nýstovnaða deild, sum deildarstjórin saman við starvsfólkunum skal skipa.**

**Deildarstjórin kemur sjálvur at mynda starvið, og fær harumframt góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.**

**Starvsøkið:**

Uppgávurnar hjá deildarstjóranum fevna m.a. um:
- ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini;
- ábyrgd av løgfrøðiliga arbeiðinum innan almannaøkið;
- ábyrgd av fíggjarstýring og fíggjareftirliti á øllum stovnum á almannaøkinum;
- ábyrgd av viðgerð av kærum, sum ikki eru lagdar til kærustovn;
- ráðgeving til stovnarnar innan almannaøkið;
- at aðrar uppgávur, ið eru viðkomandi fyri starvið, verða loystar á nøktandi hátt.

**Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur:**
- útbúgving frá hægri lærustovni
- leiðsluroyndir
- kunnleika til almannaøkið
- evni at seta í verk fyriskipanir.
- góð leiðslu- og samstarvsevni.
- vitan um tær treytir, sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting.

**Løn og setanartreytir:**

Deildarstjórin hevur tilvísing til aðalstjóran, og er javnt settur við hinar deildarstjórarnar í aðalstýrinum.

Setanarøkið er alt aðalstýrið við tilhoyrandi stovnum umframt Løgmansskrivstovan og hini aðalstýrini.

Talan er um tænastumannastarv við setanartreytum sambært løgtingslóg um tænastumenn landsins.

Starvið verður lønt í 37. lønarflokki.

**Umsóknir:**

Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-110 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 4. apríl kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 304050.

# Aðalfundurin hjá L. F. B.

verður hildin 6. apríl 2002 kl. 10 á Hotel Hafnia við hesi dagskrá:

1) Val av orðstýrara og fundarskrivara.
2) Frágreiðing formansins.
3) Framløga av grannskoðaðum roknskapi.
4) Felogini boða frá teirra vali av nevndarlimi og tiltaksmanni í nevnd L.F.B.'s
5) Val av 2 grannskoðarum og 2 tiltaksmonnum.
6) Val av umboðum og varaumboðum í nevndir og ráð.
7) Møgulig innløgd mál.
8) Ymiskt.

Nevndarfundur verður aftaná aðalfundin.

**Formaðurin**

**Nýtt**

**Rørtænastan**
**v/ Eyðfinn Hansen**



**Alt innan hita, vatn og sanitet**
**tlf. 319122 / 219122**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo